# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– 17 ára gamlir dreingir eru ikki fyrireikaðir til slíkt blóðbað sum í Irak*

*(Sara Teather, talskvinna)*

# Jakarta stendur undir í vatni



**Næstan 400.000 fólk eru flýdd frá húsi og heimi, eftir at áhaldandi regn hevur lagt meginpartin av stórbýnum undir í vatni**

Umleið tríggir fjórðingar av indonesiska høvuðsstaðnum stendur undir í vatni, og í summum býarpørtum stendur vatnið fýra metrar oman fyri gøturnar.

Minst tólv milliónir fólk búgva í býnum. Higartil eru 25 fólk funnin deyð, og næstan 400.000 eru flýdd heiman, tí húsini standa undir í vatni. Myndugleikarnir bera ótta fyri umfarssóttum, tí kloakkirnar flóta yvir. Indonesisku veðurmenninir siga frá meiri regni, og einki bendir á, at vatnið í býnum er minkandi, skrivar Reuters.

Jakarta er at kalla avbyrgdur frá umheiminum, tí vegirnir og jarnbreytirnar kunnu ikki brúkast, og aðrar skipanir so sum vatnveiting og ravmagn virka heldur ikki. Telefonsambandið er eisini slitið.

Stjórnin hevur sent fleiri túsund hermenn til býin at hjálpa teimum, sum flýggja undan vatnflóðini. Sjálvboðin hjá indonesiska Reyða Hálvmána og øðrum hjálparfelagsskapum royna eftir førimuni at bera fólki reint vatn og mat, men tað nógva vatnið í gøtunum ger hjálpararbeiðið sera trupult.

# Bretland sent 17 ára gamlar dreingir í kríggj í Irak



*Tíðindini um, at Bretland hevur sent 17 ára gamlar dreingir í kríggj í Irak, bøta neyvan um umdømið hjá Tony Blair*

**Síðani innrásina í 2003 hevur bretski herurin fleiri ferðir sent 17 ára gamlar dreingir til hertænastu í Irak**

Í sambandi við innrásina í Irak fyri skjótt fýra árum síðani setti bretska herleiðslan tiltøk í verk, sum skuldu forða fyri, at ungdómar, sum vóru yngri enn 18 ár, blivu sendir til Irak at gera tænastu.

Men skipanin hevur ikki virkað eftir ætlan, tí um vikuskiftið avdúkaði sjónvarpið Sky News, at minst 15 dreingir vórðu sendir til Irak at gera hertænastu, sjálvt um teir ikki vóru meiri enn 17 ára gamlir.

– Hetta vísir, at skipanin er ikki nóg góð, segði verjumálaráðharrin, Adam Ingram, tá sjónvarpið hevði borið tíðindini.

Men andstøðan er ikki nøgd við ta frágreiðingina. Sarah Teather, sum er talskvinna hjá liberaldemokratunum, sigur við Reuters, at 17 ára gamlir dreingir eru ikki fyrireikaðir til tað blóðbaðið, sum teir hava verið vitni til í Irak. Hon heldur, at Tony Blair, forsætisráðharri, sigur at koma við einari umbering.

### Hóttir við sak

Samstundis hóttir ein kvinna við at leggja sak ímóti verjumálaráðnum. Kvinnan, Sue Smith, misti ein son í Irak í 2005, tá bilurin, sum sonurin og nakrir av feløgum hansara vóru í, koyrdi á eina vegbumbu.

Sue Smith sigur við blaðið The Independent, at bilurin, sum sonur hennara og hinir hermenninir vóru í, var als ikki egnaður til hernaðarbrúk. Hesum hevur herleiðslan víst aftur og sagt, at tað slepst ikki undan slíkum vanlukkum. Sue Smith sigur við The Independent, at hon ætlar sær at royna málið í rættinum.

## STUTT SAGT

### Skeivt barn

Tá eini hjún í Malaysia fingu ein son í 1978, fóru grannarnir at tosa um, at konan mundi hava verið manninum ótrúgv, tí drongurin hevði ov myrkt hold til at vera sonur teirra. Pápin var eisini í iva, menn hann hevði illgruna um, at tey mundu hava fingið skeivt barn við sær av sjúkrahúsinum. So var. 21 ár seinni, í 1999, kom undan kavi, at drongurin, sum tey høvdu fingið á sjúkrahúsinum, var ikki teirra sonur, og ein DNA-kanning staðfesti, at tað var so. Av tilvild eydnaðist teimum at finna tann rætta sonin. Tað vísti seg, at hann var uppvaksin í einum muslimskum heimi. Røttu foreldur hansara eru ikki muslimar, men tað er ikki so lætt hjá soninum at skifta trúgv, tí í tí muslimska Malaysia verður tað mett sum synd, sigur BBC.

### Sjáldsom atfinning

Tað er ikki á hvørjum degi, at leiðandi japanskir politikarar finnast at USA ella amerikonsku stjórnini, tí Japan og USA hava leingi verið roknað sum lond, ið eru samd í at kalla øllum. Men nú hava Taro Aso, uttanríkisráðharri og Fumio Kyuma, verjumálaráðharri, sagt, at tað var skeivt av USA at leypa á Irak, og at amerikanski politikkurin síðani álopið hevur verið skeivur. Japan var eitt av londunum, sum sendi hermenn til Irak, men teir vórðu tiknir heimaftur seinasta summar.

### Mótmæltu ETA

Nógvir spaniumenn eru í øðini um, at stjórnin hevur gjørt av at tingast við baskiska loysingarfelagsskapin ETA. Um vikuskiftið gingu umleið 200.000 fólk mótmælisgongu í Madrid ímóti tingingunum. Millum mótmælisfólkið vóru fleiri av leiðarunum í konservativa andstøðuflokkinum PP, sum kravdu, at Jose Luiz Rodriguez Zapatero, forsætisráðharri, skal leggja frá sær, tí hann hevur gjørt av at tingast við baskiska felagsskapin.